## NØVN Í VIKUNI

## Jákup Mørk fíggjarleiðari



Frá 1. januar fer Jákup Mørk at virka sum fíggjarleiðari á Sosialinum.

Jákup hevur seinastu tvey árini havt ábyrgdina av ítróttaskrivingini á Sosialinum, og fer hann eisini framhaldandi at hava ábyrgdina av hesum økinum, men sum fíggjarleiðari fer hann eisini at verða partur av dagligu leiðsluni á blaðnum.

Jákup er 28 ára gamal, og áðrenn hann kom á Sosialin, starvaðist hann í fýra ár hjá KPMG sum grannskoðari.

## Anders Fogh kemur 14. januar



*Nýggi danski forsætismálaráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, kemur til Føroya á stutta arbeiðsvitjan*

VITJAN
*Heri á Rógvi*

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, kemur til Føroya á vitjan 14. og 15. januar.

Talan er sostatt um eina rættiliga stutta vitjan, og tað verður heldur ikki tíð til annað enn bert arbeiði.

Eftir hvat skilst, so ætlar forsætisráðharrin at kunna seg um føroysku viðurskiftini.

Av Løgmansskrivstovuni verður upplýst, at henda vitjanin er ein arbeiðsvitjan, og tað verður ikki nøkur stórvegis almenn vitjan.

Ein tílík vitjan er ikki meta við eitt nú vitjanina hjá íslendska forsetanum fyri kortum, tí hann er at meta sum statsleiðari.

Løgmaður bjóðar Anders Fogh Rasmussen hjartaliga væl komnum til Føroya, og hann sær tað sum eitt positivt tekin, at forsætisráðharrin sjálvur hevur tikið stig til vitjanina so skjótt.

Enn er alt ikki koma í rættlag viðvíkjandi ferðini hjá forsætisráðharranum, men dagarnar eru tó endaliga fastlagdir.

## GUESTHOUSE – ein nýggj fløga

**Nýggj fløga við Una Joensen kemur á marknaðin fríggjadagin í dag**

FLØGUÚTGÁVA
*Tutl*

Uni Joensen gevur í samstarvi við Ronnie Nielsen út fløguna Guesthouse.

Á fløguni eru átta løg, har Uni eigur øll orðini, og teir báðir, Uni og Ronnie Nielsen, hava smíðað tónleikin.

Tónleikurin minnir í støðum ikki sørt um Pink Floyd. Onkra aðrastaðni minnir hann um Dire Straits og Chris Rhea. Og hartil sigur Ronnie Nielsen, at hann hevur saknað tað róliga flótandi í nútíðar tónleikinum.

Tekstirnir eru merktir av einum vissum dapurskygni, snúgva seg um einsemi og líkasælu.

Tónleikarar eru sum nevnt Ronnie Nielsen, sum spælir tey flestu ljóðføri. Harumframt eru eisini garvað fólk sum Kolbein Simonsen, Sámal Ravnsfjall, Ingi Sørensen og Jóan Petur Andreassen eisini við.

# Tveir solistar á nýggjárskonsertini hjá Føroya Symfoniorkestri

**Nýggjárskonsertin hjá Føroya Symfoniorkestri í Norðurlandahúsinum sunnudagin 6. januar kl 19:30 verður send beinleiðis í Útvarpi og Sjónvarpi Føroya Hesaferð eru tveir solistar**

NÝGGJÁRSKONSERT
*Føroya Symfoniorkestur*

Andras Olsen úr Havn fer at framføra Blues Bells of Scotland á trombon. Andras Olsen hevur farloyvi frá Det Jyske Musikkonservatorium í Århus, og er á øðrum ári í útbúgving á The Royal Academy of Music í London. Nina Pavlovski úr Keypmannahavn er sopranur og útbúgvin á Det kgl danske Musikkonservatorium í Keypmannahavn og hevur millum annað verið solistur í Europa, Russlandi og Japan.

Hon fekk Aksel Schiøtz Prisen í 2000. Hon fer at syngja "Ebben Ne Andro` Lontana" eftir Catalani. Hesin tónleikur varð nýttur í filminum Diva. Úr "My Fair Lady" syngur hon "I could have danced all night". "O, mio babbino caro" eftir Puccini er eisini á skránni.

Felgssangurin verður sum vanligt Kom og dansa eftir Lehar og Kristin í Geil

Sangir fyri blandað kór og orkestur, ein føroyskur, danskur og ein íslendskur eru á skránni.

Annars verður tónleikur eftir H C Lumbye, Tschaikovsky, Offenbach , Rameau, Suppé og Strauss at hoyra. Eins og undanfarin ár verður endað við tí kenda Radetzky marsjinum. Tað er Martin Mouritsen, ið stjórnar. Sjónleikarin Páll Danielsen verður vertur.

### Fimmtiunda konsertin

Nýggjárskonsertin sunnudagin verður nummar 50 í røðini síðan orkestrið byrjaði í 1983.

Byrjað varð í smáum í 1983 tá ið Norðurlandahúsið læt upp og Musikkskúlaskipanin fór at virka. Karmur og innihald vóru bráddliga her í landinum og møguleiki gjørdist at hoyra symfoniskan konserttónleik við føroyingum, ið leiktu saman við yrkislærdum tónleikarum uttanífrá..



*Annar av solistunum á nýggjárskonsertini er Nina Pavlovski úr Keypmannahavn*

Hesi farnu árini hava nógv fólk hiðani verið við í hópinum og somuleiðis hava tónleikarar uttanefrir vitjað hendan vegin, og tað hevur verið gagnligt fyri orkestrið.

Hópurin í Føroya Symfoniorkestri er í dag samansettur av lærarum og ungum tónleikarum úr Musikkskúlaskipanini eins og góðum áhugaleikarum. Við á flestu konsertunum eru haraftrat nakrir hjálparleikarar úr symfoniorkestrunum í Keypmannahavn.

Orkestrið virkar eftir sama leisti sum í byrjanini, bert tríggjar konsertir eru árliga, um várið, heystið og beint eftir nýggjár. Tónleikararnir eru tó meira virknir enn so, og eru sjálvandi við í øðrum høpi eisini.

Á nýggjárskonsertunum verður roynt at leggja skránna soleiðis, at hon innihaldsliga er viðkomandi fyri fjøld av fólki. Her skulu tað fólksliga og hitt listarliga helst fylgjast, og hesar konsertir hava ivaleyst gjørt orkestrið meira sjónligt.

Í løtuni er orkestrið á einum vegamóti, og hvussu drúgt hetta tíðarskeið verður, ber ikki til at siga. Kósin skal setast enn einaferð og ætlanir skulu leggjast. Skal munandi menning fara fram, verður neyðugt við munadyggari fígging, soleiðis at arbeiðast kann við støðugum venjingum og framførslum alt árið.Virksemið má sjálvandi lagast til samfelagsligu fyritreytirnar her á landið, eins og við atliti til siðvanda mentanararvin uttanífrá.

# Ommudidda á Kirkju

Í nýggjársútgávuni hjá Sosialinum var grein um ommudiddi á Kirkju, sum fór at ferðast til Havnar. Í hesum sambandi hava vit fingið myndina omanfyri: Elsebeth Jacobsen (1863 –1957) suðuri í Túni á Kirkju.

Smágentan er Betta (Gilston) Danielsen. Elsebeth er langommusysti Bettu.

*Myndaeigari: Anna Johansen*





# Hornabúðin snarar lykilin um



*- Fólk vilja sleppa til handils um kvøldið. Tað snýr seg um at laga seg eftir teirri gongdini, men tað havi eg ikki hug til, sigur Gustav Samuelsen, handilsmaður*

*Mynd: Jan Müller*




*Afturlatingin hevur verið fyrireikað í fleiri ár, nógv vøra er útseld, og starvsfólkini í handlinum, sum í løtuni eru trý í tali, hava somuleiðis vitað av avgerðini.*

*Mynd: Jan Müller*

**- Tað er sjálvsagt við blandaðum kenslum, at vit lata aftur, men eg gleði meg til at sleppa at liva eitt vanligt lív. At reka handil er alt ov bundið, sigur Gustav Samuelsen, sum seinast í januar snarar lykilin um í Hornabúðini í Havn fyri seinastu ferð**

HANDIL
*Turið Kjølbro*

Seinnu árini eru nógvir handlar í Havn latnir aftur, handlar, sum hava verið til í mong, mong ár. Nú er turin komin til matvøruhandilin Hornabúðina í Havn, ið eisini selur proviant til skip. Hesin handilin, ið liggur í Hornabø og hevur havt opið í 34 ár, letur aftur seinast í hesum mánaðinum. Gustav Samuelsen eigur og rekur handilin. Pápi hansara keypti handilin fyri 34 árum síðani og Gustav hevur øll hesi árini verið í handlinum. Nú er tíðin komin at gevast, heldur hann.

- At reka handil er alt ov bundið. Eg havi arbeitt í handli síðani eg var fimtan ára gamal. Arbeiðsdagarnir eru langir, og arbeiði ofta allar dagarnar í vikuni, og tað er alt ov møðsamt í longdini, sigur Gustav Samuelsen.

At lata handilin aftur nú er ikki ein knappligt avgerð. Afturlatingin hevur verið fyrireikað í fleiri ár, nógv vøra er útseld, og starvsfólkini í handlinum, sum í løtuni eru trý í tali, hava somuleiðis vitað av avgerðini.

- Tað eru nógv ár síðani, at eg gjørdi av at lata aftur, tá ið eg gjørdist 55 ár. At eingin tímir at halda fram við handlinum, er tí, at bakarí og oljusølur hava opið so leingi. Handilin hjá okkum hevur altíð gingið væl, men treyðugt so merkja vit væl til, at aðrir handlar hava opið leingi. Sølan av vanligum handilsvørum er seinnu árini vaksin ógvuliga fitt eftir vanliga upplatingartíð. Fólk vilja sleppa til handils um kvøldið eftir øllum at døma. Tað snýr seg um at laga seg eftir teirri gongdini, men tað havi eg ikki áhuga í ella hug til, sigur Gustav Samuelsen.

### Handil hevur verið í Hornabúðini fyrr

- Tað er sjálvsagt við blandaðum kenslum, at vit lata aftur, men eg gleði meg til at sleppa at liva eitt vanligt lív. Havi havt frítíðarítriv, sum eg havi havt ov lítla tíð til. Nú gleði eg meg til at sleppa at brúka meiri tíð uppá bátin til dømis. Men fyrst fari eg at læra meg at slappa av, sigur Gustav Samuelsen.

# Mentunarvirkisætlanin undir land

**Tað hevur tikið drúgva tíð at seta orð á ein framtíðar føroyskan mentapolitikk. Nú er niðurteljingin av álvara byrjað, tí seinast í hesum mánaðinum verður mentunarvirkisætlanin hjá landsstýrinum almannakunngjørd**

MENTAN
*Turið Kjølbro*

Loksins letur til, at Mentunarvirkisætlanin hjá landsstýrinum verður veruleiki. Ein av fyrstu døgunum verður álitið sent avvarðandi pørtum, feløgum og stovnum til hoyringar. Tá ið hesin parturin er avgreiddur, verður álitið almannakunngjørt, tað vil siga um einar tvær-tríggjar vikur.

Fýra landsstýrismenn í mentamálum hava havt álitið um hendi. Um tað er orsøkin til, at tað hevur tikið so drúgva tíð at seta orð á ein komandi føroyskan mentapolitikk, er ilt at meta um, men fleiri ferðir hetta valskeiðið hevur verið boðað frá, at álitið hevur verið á gáttini.

- Tað er torført at skriva eitt slíkt álit, sum umfatar so nógv. Nógvir stovnar og feløg eru umfataði og tað tekur tíð. Sjálvsagt er tað eitt sindur spell, at álitið kemur so seint í valskeiðnum. Hendan samgongan fær ikki teir stóru møguleikarnar at gera so nógv út frá álitinum, men tað fær komandi landsstýrið so ístaðin, sigur Óli Holm.



*- Mentanin í Føroyum hevur tað gott og játtanin til mentanina er nøktandi, sigur Óli Holm, landsstýrismaður í mentamálum*

### Mentan kostar

Í samgonguskjalinum stendur, at ein greiður mentunarpolitikkur skal orðast við støði í millum øðrum mentunarálitinum »Avmarkaður marknaður«, sum varð gjørt miðskeiðis í nítiárunum. Síðani henda samgongan fór til verka hava embætisfólk í Mentamálastýrinum arbeitt miðvíst við virkisætlanini. Landsstýrismaðurin í mentamálum, Óli Holm, vil ikki siga nakað ítøkiligt um innihaldið í virkisætlanini. Ei heldur um, um virkisætlanin fer hava við sær, at meiri peningur verður settur av til mentan í komandi tíð. Fíggjarlógin, ið júst er samtykt, gevur ikki nakra ábending um, at vit fáa ein orðaðan mentapolitikk innan stutta tíð. Játtanin til mentanina stendur stórt sæð í stað í ár í mun til í fjør.

- Hækkingarnar í fíggjarlógini í fjør til mentunarøkið, sum vóru rættiliga stórar, skulu síggjast sum ein byrjan. Vit hava tíverri ikki havt møguleika at økt játtanina í sama mun aftur í ár, millum annað tí, at onnur øki eru raðfest og tí, at vit fyrst skulu hava nakrar karmar at arbeiða út frá. Hinvegin haldi eg, at mentanin í Føroyum hevur tað gott og játtanin til mentanina er nøktandi. Men sjálvsagt eru øki, sum kundu fingið meiri, sigur Óli Holm.

Játtanin til mentanina í undanfarnu fíggjarlóg vaks við tíggju prosentum í mun til árið fyri.

### Mentanarráðið

Fyrr enn nýggja mentanarvirkisætlanin verður almannakunngjørd, ber ikki til at gera nakra mynd av, hvat skapandi listafólk og mentanin sum heild kunnu vænta í framtíðini.

- Eg vóni at fáa eitt álit, sum fevnir vítt um mentanina sum heild, og at vit kunnu seta út í framtíðarkortið, hvussu mentanarlívið í Føroyum kann mennast. Í fyrstu syftu rokni eg ikki við, at játtanir til ymisk mentanarøki verða lógarfest, tí fíggjarlógin verður altíð avgerandi fyri fíggjarkarmarnar, sigur Óli Holm.

Um aðalorðaskifti verður í løgtinginum um nýggju mentanarvirkisætlanina, er støða ikki tikin til enn.

Mentanarráðið, sum Óli Holm frá fyrsta degi í landsstýrismannasessinum kunngjørdi, at hann ætlaði at seta á stovn, er ikki mannað enn. Arbeiðssetningurin hjá ráðnum verður avgreiddur í samsvari við mentanarvirkisætlanina. Landsstýrismaðurin vónar, at ráðið er farið til verka, áðrenn hetta valskeiðið er av.

## Kostnaðarlæra

**Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út bókina Kostnaðarlæra eftir Olav Absalonsen**

ÚTGÁVA

Kostnaðarlæra, sum Olav Absalonsen, lærari á Føroya Handilsskúla í Havn hevur skrivað, er tann triðja av fýra bókum í virkisbúskapi, sum eru ætlaðar til nýtslu í handilsskúla og øðrum miðnámsskúlum. Í handilsskúlanum er hon ætlað at nýta í undirvísingini í virkisbúskapi á hægri handilsútbúgving.

Innihaldið í bókini er í høvuðsheitum fastur og broytiligur kostnaður, inntøka, marknaður og kostnaðarbýti.

Umframt til undirvísingina í skúlanum er




Kostnaðarlæra eisini ætlað til sjálvlestur hjá teimum, sum hava áhuga fyri virkisbúskapi.

Hinar báðar bøkurnar í røðini, sum áður eru komnar út, eru Bókhald og ársrokniskapur eftir Olav Absalonsen og Virkið eftir Heðin Samuelsen, ið kom í fjør.

Kostnaðarlæra er 77 síður til støddar og fæst í bókabúðunum fyri 96 krónur.